# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt stig til vinstru

Sosialistiski flokkurin í Spania við tí vælumtókta forsætisráðharranum José Luis Rodriguez Zapatero vann parlamentsvalið í Spania í gjár. Sosialistiski flokkurin fekk 43,9% av atkvøðunum móti 40,2% til konservativa andstøðuflokkin, og hetta merkir, at flokkurin hjá Zapatero heldur fram við at stjórna Spania komandi fýra árini. Spania tók enn eitt stig til vinstru. Valúrslitið er sera áhugavert eitt nú tí tað merkir, at konservativu kreftirnar í Europa ikki longur eru so sterkar, sum tær hava verið og alt bendir á, at høgrarákið fer at venda. Valstríðið hevur verið sera hart, og ágangurin frá konservativu flokkinum hevur verið sera harður. Fyri fyrstu ferð síðan deyða Francos hevur katólska kirkjan lagt seg út í eitt valstríð við at heita á allar katolikkar um at velja konservativa flokkin.

Undir einaræðinum hjá spanska facsistaflokkinum undir Franco var kirkjan einvíst í parti við Franco. Men eftir at Spania varð skipað sum fólkaræði við deyða Francos, hevur kirkjan hildið seg uttanveltaða heilt fram til hetta valið. Nógv bendir á, at sponsku veljarunum ikki líkaði hesa uppílegging frá kirkjuni, og er uppíleggingin so komin katólsku kirkjuni aftur um brekkur. Spania hevur í ártíggjur drigist við yvirgang frá baskisku loysingarørlsuni ETA. Hóast drúgvar royndir hevur tað ikki eydnast Zapatero at koma til sættis við baskisku loysingarrørlsuna, og alt bendur á, at yvirgangurin fer at halda fram.

Spanska fólkið hevur klárt og greitt atkvøtt fyri at byrjast skal ein nýggj tíð í Spania, soleiðis tók Zapatero til, tá úrslitið varð klárt. Við hesum ger hann greitt, at eftir fýra ára upptak í seinasta valskeiði eftir konservativa stjórnarskeiðið undan hesum júst farna, verður nú av álvara farið undir at byggja spanska vælferðarsamfelagið. Spania tekur av fullum huga undir við ES limaskapinum, men er ikki longur so tætt knýtt at USA sum undir konservativa skeiðinum. Spania hevur seinastu fýra árini undir leiðslu Zapateros vunnið sær stóra virðing í heiminum, serstakliga í Europa og í Latínamarika. Við tí unga og karismatiska Zapatero á odda fer Spania at halda fram við hesi kós og gongur sum nógvir eygleiðarar spáa, so fer Spania at gerast eitt av teimum fremstu londunum í ES bæði tá tað ræður um politiska ávirkan í ES samveldinum og um vælferð spanska fólksins.

**Sosialurin**

## Moodyanalysan vektað í fíggjarmálaráðnum



JOHAN SAMUELSEN

Fyrstu ferð í søguni eru óheftar altjóða fíggjar- og búskaparmetingar gjørdar av fíggjarstøðu Føroya av tí høgt metta Moody stovninum, og kunnu vit føroyingar vera bæði stoltir og glaðir um úrslitið, har vit liggja á einum triðjaplássi í lutfalli til grannar okkara. Fráfarandi landsstýrið eigur stóra tøkk fyri at farið varð undir hetta tiltak, so vit verunliga hava sambærilig búskapartøl, sum lýsa, hvussu búskapar- og fíggjarstøðan er hjá okkum í mun til grannar okkara, har norðurlond annars øll liggja á fremsta plássi, av 21 møguligum stigum.

Annars verður m.a. víst á, at føroyska ratingin er tengd at Danmark og ríkisveitingini, og um vit vóru hana fyriuttan, so lógu vit niðri á einum 5. plássi, t.v.s á sama stigi sum eitt nú Portugal á ratinglistanum, sum telist millum fátækastu londini í Vesturevropa!

Men í staðin fyri at gleðast um úrslitið, sum fyriliggur frá Moody, so fer fíggjarmálaráðharrin at sálda millum, hvat er gott við frágreiðingini, og hvat er minni gott – og henda sálding fer fram gjøgnum núverandi og fyrrverandi nationalu brillurnar hjá Karsteni! Spurdur um tann veruleika, at ríkisveitingin og (enn!) stabilu viðurskiftini millum Danmarkar og Føroyar eru trygdin fyri varðveitingina av triðja plássinum, so fer maðurin at garta í, og kemur við einkisigandi úttalilsum, sum “føroyingar eru eitt stolt fólk”, og so “eg trúgvi, at vóru vit eitt sjálvstøðugt land, so lógu vit har sum hini norðurlondini liggja”. Fyri tað fyrsta, hetta eru ikki fakliga ella virðilig úttalilsi frá einum fíggjarmálaráðharra, og hava als einki við nakrar trúarspurningar at gera! Fyri tað næsta, so er hetta ein heimagjørdur pástandur uttan minsta vet av prógvum, sum gongur beint ímóti tí, sum Moody stovnurin, kanska hin dyggasti og hægstmetti á sínum øki í heiminum, júst hevur kannað fyri heimastýrið og almannakunngjørt, sum neyva, eksakta vitan – (Tað er beinleiðis vandi fyri, at álitið á Moody fellur um allan heim, um tey frætta um hesa “beinraknu” analysuna á Argjum!). Og so boðar Karsten frá, at føroyskt bankaeftirlit skal setast á stovn! Allur føroyski bankaheimurin øtast. Júst nú í hesum árum, tá føroysku bankarnir og fíggjarheimurin annars hava metúrslit, og rættuliga eru komnir fyri seg eftir kreppuárini í 90-unum. M. a. tí farið er út í heim at reka bankavirksemi, haðani meginparturin av vinninginum hjá bankunum stavar frá, og tí tørvar teimum absoluttan frið og arbeiðsnáðir, so kemur Landsstýrið við hesi yvirtøkuætlanini av bankaeftirlitinum, sum alt vit og skil vísir, fer at ørkymla fíggjarheimin og okkara møguleikar har, sambært Janusi Petersen og Peturi Holm, nú føroysku bankarnir á jøvnum føti skulu kappast á altjóða peningamarknaðinum og verða kursvigaðir í peningaskálunum hvønn einasta dag – uttan professinelt bankaeftirlit verður hetta tungur burður at lyfta. Øll, sum hava við peningaviðurskifti at gera, vita, at gandaorðið er álit og aftur álit á peningamarknaðinum, og um tað ríkur, so kann tað verða til óbótaligan skaða fyri landið, men so sanniliga eisini fyri hvønn einstakan av okkum við øktum rentum, versnandi lániviðurskiftum o.s.fr. o.s.fr.

Og við hesi ætlaðu yvirtøkuni hjá Landsstýrinum, so er hetta at meta sum fíggjarmálaráðharrin gongur á odda í at órógva okkara fíggjarstøðu og fær peningaskipanina at ridla. Henda vinnan, sum verunliga hevur ment seg úti í heimi, har dugnalig bankafólk, saman við góðum leiðslum, hava megnað at uppbygt ein burðardyggan fíggjarsektor, so vit næstan kunnu tosa um eina sólskinssøgu. Og nýggi nationali fíggjarmálaráðharrin stuðlar ikki uppundir, heldur tvørturímóti. Fremsta uppgáva hjá einum og hvørjum fíggjarmálaráðharra er annars at skapa fíggjarligt og búskaparligt trygt støði fyri framhaldandi samfelagsmenning! Og so talaði hann og hansara flokkur í valstríðnum fyri góðum mánað síðani, at fáa hjartað inn aftur í føroyskan politikk! Nei, her er onki hjarta at finna, harða tjóðveldishjartað vinnur á bleytum samhaldsføstum virðum, sum Miðflokkurin segði seg at umboða, og kann slíkt “hjarta” vera við at køva allan framburð í Føroyum, og harvið sum fráliður, vinnu- og lívsmøguleikarnar – ikki eiti á lyftisbrot!

Fyrrverandi formaður Karstens, Høgni Hoydal, sum kallar seg uttanríkisráðharra fyri “Kongeriget Danmark, for så vidt angår Færøerne”, (mær kunnugt hava vit bert tann eina og hann eitur Per Stig Møller!) heitir á allar góðar kreftr um at varðveita umdømi Føroya sum eina felags søk – ja, mangur føroyingur hevur hug at spyrja í løtuni, hvør er tað sum brýtur umdømi Føroya niður – enntá við beráddum huga???

Var tað hetta vit valdu 19. januar?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støđd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.